VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 16.11.2024 kl. 10:00 |
| **Fundarstaður:** | Býráðsskrivstovan |
| **Málnr.:** | 24/00492 |

Til staðar: Bjarni Prior, Jóanis Albert Nielsen, Elsibet Jacobsen, Súsanna Nordendal, Beinta Gudmundsen, Ingi Wiberg, Thilda Hansdóttir í Líðini, Jónhard Selfoss, Gunnvá S. á Lofti, Dánjal A. Hansen

Varalimir:

Ikki til staðar:

Aðrir partar:

Fundarskrivari: Jóhan Hendrik Ellefsen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | | |
| 1/25 | 24/00493-1 | Val av borgarstjóra | 2 |
| 2/25 | 24/00494-1 | Val av varaborgarstjóra | 3 |
| 3/25 | 24/00495-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina | 4 |
| 4/25 | 24/00496-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í teknisku nevnd | 6 |
| 5/25 | 24/00497-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í vinnu- og havnanevndina | 8 |
| 6/25 | 24/00498-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum til mentunar- og trivnaðarnevndina | 10 |
| 7/25 | 24/00499-1 | Val av tilbúgvingarnevnd | 12 |
| 8/25 | 24/00500-1 | Val av 3 limum og tiltakslimum í stýrið fyri Vesturvón | 13 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9/25 | 24/00501-1 | Val av limi og tiltakslimi í til nevndina í IRF | 14 |

**Til afgørelse**

## 1/25 Val av borgarstjóra

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 1/25 |

**Málslýsing:**

Sambært § 6 í kommunustýrislógini er ásett:

"Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja til borgarstjóra, varaborgarstjóra, nevndarlim ella umboð, umframt at gera aðrar kommunalar uppgávur, sum kommunustýrið áleggur honum.

Stk. 2. Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2."

**Býráðið 01. januar 2025:**

Jóanis Albert Nielsen skjýtur upp at velja Bjarna Prior sum borgarstjóra.

Einmælt samtykt at velja Bjarna Prior til borgarstjóra.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 2/25 Val av varaborgarstjóra

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 2/25 |

**Málslýsing:**

Sambært § 6 stk. 3 í kommunustýrislógini er ásett:

Varaborgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Varaborgarstjórin er í borgarstjórans stað, tá hesum berst frá, sí tó § 24, stk. 2. Ásetir kommunustýrisskipanin, at 1. og 2. varaborgarstjóri skulu verða valdir, fer valið fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

Sambært § 2 í kommunustýrisskipanini er ásett:

*Býráðið velur ein borgarstjóra, ið er settur við setanarbrøkinum 1/1, og ein varaborgarstjóra, sbrt. § 6 í kommunustýrislógini.*

Lutfalsval.

**Býráðið 01. januar 2025:**

Bjarni Prior skjýtur upp at velja Jóanis Albert Nielsen sum varaborgarstjóra.

Einmælt samtykt at velja Jóanis Albert Nielsen til varaborgarstjóra.

Formansváttan:____________

## 3/25 Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 3/25 |

**Málslýsing:**

Sambært § 28 og § 38 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28 Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 38 Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar. Borgarstjórin er nevndarformaður.

Stk. 2. Fíggjarnevndin samskipar og fylgir við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið. Viðvíkjandi fíggjarnevndini er ásett í §§ 10-12 í kommunustýrisskipanini at:

**§ 10.** Í fíggjarnevndini sita borgarstjórin, ið er nevndarformaður, og 4 aðrir býráðslimir.

*Stk. 2.* Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum viðurskiftum, ið eru løgd til hana sbrt. kap. 8 í kommunustýrislógini.

*Stk. 3.* Nevndin ger uppskot og tilmæli til býráðið um:

1. kassa- og bókhaldsførsluskipan,
2. lántøku, veðsetan, rakstraravlop og tílíkt, og
3. eykajáttanir.

Ein frágreiðing frá nevndini skal fylgja við einum og hvørjum máli, ið viðvíkur kommunalum planleggingaruppgávum, tá málið verður lagt fyri býráðið til avgerðar.

*Stk. 4.* Nevndin:

1. tekur sær av fíggjarligu planleggingini og samskipar kommunalu planleggingaruppgávurnar,
2. ger felags forskriftir fyri planleggingina og hjálpir hinum nevndunum við at útvega neyðugt grundarlag fyri teirra planleggingararbeiði, og
3. Ger metingar um fíggjarligu avleiðingarnar av teimum gjørdu planuppskotunum og ger tilmæli til býráðið.

Formansváttan:__________

*Stk. 5.* Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av:

1. keypi, sølu og veðseting av fastari ogn, og
2. starvsfólka- og arbeiðsviðurskiftum og líknandi málum.

**§ 11**. Fíggjarnevndin ger reglur fyri:

1. Skipanini av umsitingarliga eftirlitinum, sbr. § 12
2. Trygging av kommunalum ognum
3. Hvussu borgarstjórin og umsitingin fer fram í starvsfólkamálum
4. Samskipan av keypi

**§ 12**. Fíggjarnevndin hevur eftirlit við, at:

1. fíggjarognir verða umsitnar forsvarliga og í samsvari við avgerðir hjá býráðnum,
2. umsitingin av kommunukassanum og roknskaparføringin hjá kommununi er forsvarlig,
3. ikki verður farið út um játtanirnar á fíggjarætlanini uttan, at býráðið hevur samtykt hetta, og
4. skjalagoymslan hjá kommununi er forsvarlig

*Stk. 2.* Nærri reglur um umsitingina av kommunalu ognunum verða ásettar í einari bókhaldsførsluskipan, sbrt. § 38, stk. 3, nr. 1, í kommunustýrislógini

Lutfalsval

**<u>Býráðið 01. januar 2025:</u>**

Vald vórðu:
- Bjarni Prior
- Albert Ó. Ellefsen
- Gunnvá S. á Lofti
- Súsanna Nordendal
- Thilda H. í Líðini

Formansváttan:________

# 4/25 Val av 5 limum og tiltakslimum í teknisku nevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 4/25 |

**Málslýsing:**

Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28. Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 29. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi teknisku nevnd er ásett í § 15 í kommunustýrisskipanini at:

**§ 15**. Tekniska nevnd hevur 5 limir, ið allir skulu vera býráðslimir.

*Stk. 2.* Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum kommunalu uppgávunum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd ella samstørv, ið viðvíkja tekniska og umhvørvisliga økinum og lendisøkinum.

*Stk. 3.* Við útgangsstøði í byggisamtyktini tekur nevndin sær av:

1. Býar- og byggisamtyktum,
2. byggi- og bústaðarviðurskiftum,
3. umhvørvisvernd,
4. matvørulógini,
5. kollektivari samferðslu/undirsjóvartunnil,
6. renovatión,
7. vatnveiting,
8. áum,
9. vegum,
10. at samstarva við privatar og sjálvsognarstovnar á økinum hjá nevndini,

*Stk. 4* Í samstarvi við fíggjarnevndina, sbr. § 10, ger nevndin uppskot og tilmæli til býráðið um:

Formansváttan:____________

1. íløguætlanir fyri økini, ið eru nevnd í stk. 2, og
2. gjøld fyri veitingarvirki.

*Stk. 5.* Nevndin tekur sær av rakstri og viðlíkahaldi av:

1. kommunalum virkjum og veitingarvirkjum,
2. frárensluverkum,
3. frítíðarøkjum,
4. kirkjugørðum, og
5. kommunalum bygningum og anleggum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd.

Lutfalsval.

**<u>Býráðið 01. januar 2025:</u>**

Vald vórðu
- Albert Ó. Ellefsen
- Gunnvá S. á Lofti
- Elsibet Jacobsen
- Jóanis Albert Nielsen
- Jónhard Selfoss

Formansváttan:__________

## 5/25 Val av 5 limum og tiltakslimum í vinnu- og havnanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 5/25 |

**Málslýsing:**

Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28. Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 29. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi mentamálanevndini er ásett í § 16 í kommunustýrisskipanini at:

**§ 16**. Vinnu- og havnanevndin hevur 5 limir, ið allir skulu vera býráðslimir.

*Stk. 2.* Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum kommunalu uppgávunum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd ella samstørv, ið viðvíkja vinnu- og havnaøkinum.

*Stk. 3.* Vinnu- og havnanevndin tekur sær av:

1. vinnumálum.,
2. ferðavinnumálum, og
3. havnum.

*Stk. 4.* Í samstarvi við fíggjarnevndina, sbr. § 10, ger nevndin uppskot og tilmæli til býráðið um:

1. íløguætlanir fyri økini, ið eru nevnd í stk. 3.

*Stk. 5.* Nevndin tekur sær av rakstri og viðlíkahaldi av:

1. havnaviðurskiftum.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Lutfalsval

**Býráðið 01. januar 2025:**

Vald vórðu

- Jóanis Albert Nielsen
- Beinta Gudmundsen
- Ingi Wiberg
- Dánjal A. Hansen
- Jónhard Selfoss

Formansváttan:______________

## 6/25 Val av 5 limum og tiltakslimum til mentunar- og trivnaðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 6/25 |

**Málslýsing:**

Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28. Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 29. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi mentanar- og trivnaðarnevndini er ásett í § 17 í kommunustýrisskipanini at:

§ 17. Mentanar- og trivnaðarnevndin hevur 5 limir, ið allir skulu vera býráðslimir.

Stk. 2. Nevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av teimum kommunalu uppgávunum, ið ikki hoyra undir aðra nevnd ella samstørv, ið viðvíkja almanna- og heilsuøkinum.

Stk. 3. Mentanar- og trivnaðarnevndin tekur sær av:

1. Fólkaskúla og kvøldskúla,
2. bókasavnsviðurskiftum,
3. savnsviðurskiftum,
4. musikkskúlum og øðrum musikk tiltøkum,
5. ítróttar- og mentanarviðurskiftum,
6. uppgávum viðvíkjandi kommunalum ansingarstovnum og stovnum fyri eldri,
7. kirkjugørðum,
8. dagtilboðum til børn og frítíðarskúlan,
9. frítíðartiltøkum fyri børnum, ungum og gomlum,
10. sáttmálum, ið kommunan hevur við sjálvsognarstovnar og kommunal samstørv á økinum hjá nevndini,

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

11. útláni og útleigan av hølum í kommunalum bygningum til feløg v.m. á økinum hjá nevndini,

Stk. 4. Í samstarvi við fíggjarnevndina, sbr.§ 10, ger nevndin uppskot og tilmæli til býráðið um:

1. Reglur fyri útláni og útleigu av hølum í kommunalum ognum á økinum hjá nevndini,
2. rakstrar- og viðlíkahaldsætlanir fyri bygningar á økjum hjá nevndini, og
3. íløguætlanir á økinum hjá nevndini.

Lutfalsval

**Býráðið 01. januar 2025:**

Vald vórðu
- Súsanna Nordendal
- Elsibet Jacobsen
- Beinta Gudmundsen
- Ingi Wiberg
- Thilda H. í Líðini

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 7/25 Val av tilbúgvingarnevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 7/25 |

**Málslýsing:**

Viðvíkjandi tilbúgvingarnevndini er ásett í § 19 í kommunustýrisskipanini at:

**§ 19**. Tilbúgvingarnevndin verður sett eftir reglunum í løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving.

Kommunan skal seta eina tilbúgvingarnevnd til fyrisiting av kommunalu tilbúgvingini.

*Stk. 2.* Í tilbúgvingarnevndini fyri Vága kommunu sita 5 limir:
borgarstjórin, sum er formaður, formaðurin í teknisku nevnd,ein býráðslimur,einum limi tilnevndur av fútanum og tilbúgvingarleiðaranum, sum er fastur limur. Tekniski leiðarin er skrivari hjá Tilbúgvingarnevndini.

*Stk. 3.* Val av limum í tilbúgvingarnevndina fer fram aftaná hvørt býráðsval.

Lutfalsval.

**Býráðið 01. januar 2025:**

Vald vórðu
- Bjarni Prior
- Albert Ó. Ellefsen
- Dánjal A. Hansen

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 8/25 Val av 3 limum og tiltakslimum í stýrið fyri Vesturvón

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 8/25 |

**Málslýsing:**

Viðvíkjandi Stýrinum fyri Vesturvón er ásett í § 22 í kommunustýrisskipanini at:

***§ 22****. Býráðið velur limir í stýrið í Heimatænastuni í Vágum, eftir samstarvsavtaluni millum Vága kommunu og Sørvágs kommunu.*

3 limir skulu veljast í stýrið fyri Vesturvón – borgarstjórin er fyrstvaldur. Harafturat skulu veljast 2 varalimir.

Heimatænastan í Vágum (Vesturvón) er skipa sum eitt javnbjóðis samstarv millum Vága- og Sørvágs kommunu. Í stýrinum sita 5 limir, 2 frá Sørvágs kommunu og 3 frá Vága kommunu. Kommunurnar skiftast um formannin, sum situr í 2 ár hvørja ferð.

**Býráðið 01. januar 2025:**

Vald vórðu

- Bjarni Prior
- Albert Ó. Ellefsen
- Súsanna Nordendal

Formansváttan:____________

# 9/25 Val av limi og tiltakslimi í til nevndina í IRF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 01.01.2025 | 9/25 |

**Málslýsing:**

Limur og tiltakslimur skal veljast í nevndina fyri IRF.

§ 14 í viðtøkunum fyri IRF er sojlóðandi:

**Nevndin**
**14. grein**
Í nevndina verða valdir seks limir, ið eru kommunustýrislimir, og sita fyri eitt valskeið ísenn og verða valdir eftir hesum reglum:
- Limakommunurnar í Norðoyggjum velja ein,
- Limakommunurnar í Eysturoy, tó ikki Sunda kommuna, velja ein,
- Limakommunurnar í Streymoy saman við Sunda kommunu velja ein,
- Limakommunurnar í Vágum velja ein,
- Limakommunurnar í Sandoy og Skúvoy velja ein og
- Limakommunurnar í Suðuroy velja ein.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.
Um atkvøður standa á jøvnum, skal formansins atkvøða verða avgerandi.Tiltakslimur verður valdur sambært stk. 2, og tekur hesin sæti í nevndini, tá einum nevndarlimi berst frá.
Nevndin kann seta stjóra, og hevur meðan eingin stjóri er settur leiðsluna av felagnum.

Meirilutaval

**Býráðið 01. januar 2025:**

Einmælt samtykt at velja Gunnvá S. á Lofti.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 10.25

Bjarni Prior

Albert Ó. Ellefsen

Gunnvá S. á Lofti

Thilda H. í Líðini

Jónhard Selfoss

Jóanis Albert Nielsen

Súsanna Nordendal

Elsibet Jacobsen

Ingi Wiberg

Dánjal A. Hansen

Beinta Gudmundsen

Formansváttan:____________